

Kirkjan varð pyntað við einglum, sum næmingar úr 1. og 2. flokki høvdu gjørt. So her var talan um eitt barna- og næmingatiltak burturav

# Barnajól í Ólavskirkjuni








JÓL
*Jan Müller*

Á hvørjum ári undan jólum er serstakt jólahald í landsins elstu kirkju, Ólavskirkjuni í Kirkjubø fyri børnunum í sóknini og teimum, sum ganga í skúlanum á Velbastað. So var eisini í ár. Hóskvøldið vóru tey 37 skúlabørnini saman við foreldrum og systkjum savnað í kirkjuni til jólahald og skúlaguðstænastu. Bergur Debes Joensen, prestur helt guðstænastuna.

Tað serstaka við hesum afturvendandi tiltakinum er, at tað eru næmingarnir sjálvir, tvs. teir í 3. og 4. flokki í skúlanum á Velbastað, sum taka sær av øllum hátíðarhaldinum. Teir lósu inn- og útgangsbøn í felag. Nøkur teirra lósu brot úr Gamla Testamenti. Næmingarnir høvdu eisini valt sálmarnar og teir lósu jólaevangeliið. Har var so eisini eitt barnakór, sum sang jólasálmar, og næmingar spældu eisini uppá klarinet, guitar og blokkfloytu.





Jólafriðurin hevur lagt seg yvir føroysku kirkjurnar, men prestarnir innan kirkjugátt ganga í fleiri bólkum, tá tað ræður um yvirtøkuna. Nú skal ein politisk avgerð takast

# Prestar ganga í fleiri bólkum

**Tað verður ikki við vælsignilsi frá øllum føroyskum prestum, at kirkjan verður yvirtikin beinanvegin. Teir eru ósamdir um hvussu, nær og um hon yvirhøvur skal loysast frá teirri donsku. Tí krevst nú, at skorið verður ígjøgnum politiskt**

FÓLKAKIRKJAN
*Ingi Rasmussen*

Føroysku prestarnir eru alt annað enn samdir um eina yvirtøku av fólkakirkjuni. Teir flestu halda, at kirkjan skal yvirtakast, men semja er ikki um hvussu.

Tað vísir ein spurnarkanning, sum danska blaðið Kristelig Dagblad hevur gjørt millum føroysku prestarnar.

Sambært blaðnum býta prestarnir seg í tríggjar nærum líka stórar bólkar. Ein triðingur svarar treytaleyst játtandi til eina yvirtøku beinanvegin. Aðrir siga tað vera best at bíða, til tað fyrireikandi lógararbeiði er gjørt. Og tann síðsti bólkurin, sum er nakað minni enn hinir, siga bara nei takk til nakra yvirtøku av fólkakirkjuni yvirhøvur.

## Niðursett ferð

Sum Sosialurin skrivaði 7. desember, so er ferðin sett niður í eini roynd at fáa kirkjuna trygt í havn. Ætlanin var, at Tove Fergo kirkjumálaráðharri skuldi koma til Føroya longu tann 16. desember at skriva undir endaligu yvirtøkuavtaluna, men ferðin var avlýst, tí politiska viðgerðin varð ógreið í ellinta tíma.

Eitt uppskot til eina avtalu um yvirtøkuna er annars gjørt, og er í løtuni til viðgerðar hjá Løgmansskrivstovuni, váttar Sigmund Isfeldt, fulltrúi. Talan er um eina stutta avtalu, sum leggur karmarnar um eina yvirtøku.

Spurningurin er, um tað er nóg mikið, tí Kári P. Højgaard úr Sjálvstýris-flokkinum, sum er avgerandi 17. maðurin hjá samgonguni, hevur sett føtur í spenni. Hann sigur við Sosialin, at kirkjan verður ikki yvirtikin við hansara stuðli, fyrr enn øll framtíðin hjá fólkakirkjuni er greið og fyrireikað í samstarvi við allar partar í kirkjuni.

## Eftirlýsa styrki

Ósemja er sostatt bæði innan kirkju- og tinggátt, og sjálvt samgongumenn, sum hava niðurfelt yvirtøkuna í samgonguskjalið, eru trekir.

Tað ger ikki støðuna lættari hjá landsstýriskvinnuni við kirkjumálum Annlis Bjarkhamar.

Nú eftirlýsa prestarnir Sonja Klein og Petur Martin Rasmussen, ið sótu í nevndini, sum fyrireikaði kirkjuyvirtøkuna, at landsstýrið vísir styrki í málinum.

Meiningin hjá kirkjuni er langt síðani hoyrd í nevndararbeiðnum. Tað er nú, at politikarnarnir skulu handla, um teir ynskja at loysa kirkjuna frá Danmark, sigur Sonja Klein, sum fær stuðul frá Peturi Martin Rasmussen. Hann sigur tað vera eina torføra avgerð, men skal kirkjan loysa, so krevur tað, at politikarar taka støðu og eru førir fyri at virka eftir tí.

# Stólurin brennir undir Jørgini

**Skeiv málsviðgerð og vantandi metingar í Fiskimálaráðnum havaført til milliónatap hjá landskassanum. Tí stendur Jørgin Niclasen fyri sínari truplastu tíð sum landsstýrismaður. Frágreiðingin til landsstýrismálanevndina talar ikki hansara søk**

KANNING
*Ingi Rasmussen*

Sessurin hjá Jørgini Niclasen í landsstýrinum er í vanda.

Tað kann í øllum førum staðfestast, nú Turið Debes Hentze advokatur hevur latið landsstýrismálanevndini hjá løgtinginum frágreiðing um embætisførsluna hjá Jørgin Niclasen, landsstýrismanni við fiskivinnumálum.

Kanningarstjórin hevur ikki gjørt nakra samanfatandi niðurstøðu, tí talan er um trý ymisk skipamál, har lán til rækjutrolarar eru løgd um. Tað tykist kortini greitt, at umsitingin í fiskimálaráðnum í tveimum førum hevur verið á samanstoytskós við lógina um umlegging av lánum til fjarfiskiflotan.

Løgfrøðingar, sum Sosialurin hevur tosað við, eru ikki sinnaðir at siga nakað alment um málið, tí teir hava ikki nærlisið frágreiðingina, sum telur oman fyri 70 síður. Men út frá teimum upplýsingum, sum higartil eru komnar fram, halda teir, at Jørgin Niclasen fær tað trupult næstu tíðina.

## Milliónatap

Trý skip eru kannað, og í tveimum førum hevur landsstýrismaðurin sett almenna ogn í størri vanda fyri tapi enn neyðugt. Tá lánini hjá Høgafossi og Arctic Viking vórðu løgd um, skuldi fíggjarstøðan eftir lógini verið tikin upp og mett av nýggjum, men tað var hon ikki í nóg góðan mun.

Við øðrum orðum hevur vansketni hjá landsstýrismanninum og hansara umsiting sent skattaborgarunum eina eykarokning upp á 11,5 mió. kr. Og tað er álvarsligt.

Áður hava mál verið frammi, har viðurskifti hjá landsstýrismonnum hava víst seg at verið óreglulig. Í hesum føri vísir tað seg, at óreglusemi beinleiðis hevur ført eitt tap við sær fyri landskassan. Tí tykist málið greiðari hesaferð.

## Lógin ikki fylgd

Tey trý skipamálini, sum eru kannað, eru Ocean Castle, Høgifossur og Arctic Viking.

Um Ocean Castle sigur kanningarstjórin, at umsitingin kundi verið meira heppin, men beinleiðis ólóglig er hon neyvan.

Tað var hon í hinum báðum førinum. Høgifossur kostaði landskassanum 7 mió. kr. eyka, og Arctic Viking kostaði 4,5 milliónir.

Um Høgafoss sigur Turið Debes Hentze, at landsstýrið ikki hevur viðgjørt hetta mál, sum tað eigur, at málsviðgerðin ikki hevur verið fullfíggjað, og at úrslitið kundi verið eitt annað, um rætta mannagongdin varð fylgd.

At landsstýrismaðurin hevur ábyrgdina er ongin ivi um. Hann hevur havt kunnleika til málið, og hann eigur tí eisini at vita, at mannagongdin ikki hevur verið fylgd, ljóðar tyngjandi frágreiðingin.

## Ongin meting

Eitt krav í lógini um umlegging av lánum til fjarfiskiflotan er, at ein meting skal gerast av fíggjarstøðuni. Tað var hon ikki, tá lánið hjá Arctic Viking varð lagt um. Tað var hon heldur ikki, hóast umsøkjarin undir málsviðgerðini boðar frá munandi lánitørvi, sigur frágreiðingin.

Aftur er tað landsstýrismaðurin, sum hevur evstu ábyrgdina og eigur at gera seg kunnugan við ta mannagongd, sum umsitingin hevur avgjørt at nýta í hesum málum. Hann eigur tí eisini at vita, at lógin krevur, at ein meting verður gjørd í hesum máli.

## Fleiri møguleikar

Spurningurin er so, hvørjar avleiðingar málið fær.

Bjørn á Heygum, advokatur, sum hevur lisið frágreiðingina, var rættiliga avgjørdur í Útvarpi Føroya hóskvøldið og segði, at landsstýrismaðurin eigur at leggja frá sær beinanvegin.

Jørgin Niclasen sjálvur hevði hug at sáa iva um niðurstøður í Degi og viku hóskvøldið. Fer hann ikki sjálvboðin, endar bólturin hjá løgmanni.

Løgmaður hevur ikki gjørt viðmerking til málið enn. Vil hann ikki seta Jørgin frá, kann misálit reisast í løgtinginum.